**Skúlastýrisfundur nr. 6 – 2025**

**Stað:** Skúlin á Argjahamri – Stórastova
**Dato:** 04.11.2025

**Møtt á fundi:**
Ása Christiansen, skúlastýrisforkvinna
Guðrun Kerá, foreldraumboð
Paula Neshamar Thomassen, foreldraumboð
Anita á Fríðriksmørk, kommunustýrisumboð
Høgni Vilhelmsen, kommunustýrisumboð
Louisa Niclasen, læraraumboð
Marin S. Bláberg, skrivari

---

**Mál á skrá**

**Prát um komandi skúlaár**

Skúlastjórin kunnaði um støðuna hjá 1. flokki komandi skúlaár.
Skúlin hevur fingið undantaksloyvi at taka 48 næmingar inn. Sum støðan er nú, sær út til at verða pláss fyri teimum.

Tó væntast trupulleikar í august 2027, tá væntast eini 55 næmingar í skúlaøkinum.
Skúlin kann í mesta lagi taka 48 næmingar inn.

---

**Kunning um verkætlanirnar hjá skúlanum**

Skúlin hevur tvær uttanduraverkætlanir:

1. Kurvabóltsbani og hugnaøki vestanfyri skúlan.
2. Sparkivøllur til grunddeildina.

Skúlin hevur fingið játtað pening til endamálið, men tað er trupult at fáa ætlanirnar framdar. Bygningsdeildin hjá Tórshavnar kommunu hevur fingið uppgávuna at seta arbeiðið í verk.

Kunnað varð eisini um, at skúlin hevur søkt kommununa um dupult brunaloyvi til høllina.

---

**Annað**

Tosað varð um slitnu næmingastólarnar. Plastikkið er farið at bila, og stólarnir braka so illa, at konstantur larmur er í skúlastovuni.
Avgjørt varð, at skúlastjórin skuldi søkja um nýggjar stólar til skúlan.

---

**Fundartíð:** 16.00–19.00